## Fyrireikar sinnissjúkuverju

Sakførarin Rudolf Mayer sigur seg halda, at 73-ára gamli Josef Fritzl, sum gjøgnum 24 ár hevur hildið dóttir sína innilæsta og ferð eftir ferð hevur neyðtikið hana, er sinnissjúkur. Mayer segði, at serfrøðingar mugu gera av, hvør mentala støðan hjá Fritzl er, og um hann er førur fyri at verða rættarsøktur. Løgregluumboð siga, at Josef Fritzl í síðstu viku viðgekk seg sekan í av hava lokkað dóttir sína niður í kjallaran, har hann doyvdi hana og neyðtók hana. Síðani leinkjaði hann 18 ára gomlu dóttir sína og læsti hana inni. Hesi 24 árini neyðtók hann dóttrina minst triðja hvønn dag, og fekk tilsamans sjey børn saman við henni, harav tað eina doyði stutt eftir føðingina. Men longu tá Elisabeth Fritzl var 11 ára gomul, byrjaði faðirin at misnýta hana kynsliga og hetta helt so fram til í síðstu viku, tá Josef Fritzl lat elstu dóttrina, sum er ógvuliga sjúk, sleppa á sjúkrahús. Har vórðu ræðuleikarnir so avdúkaðir og Josef Fritzl handtikin.



# Tíðarætlan og prísur halda

**Higartil eru 33,4 milliónir brúktar upp á miðnámsskúladepilin í Hovi og tá ið hann er liðugur, kostar hann 82,4 milliónir og hann verður klárur at taka í brúk á nýggjárinum**



*Skúladepilin í Hovi verður seinkaður eitt hálvt ár*

MIÐNÁMSSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Higartil eru 33,4 milliónir krónur brúktar upp á arbeiðið at byggja nýggja skúladepilin í Hovi.

Tað upplýsir Una Joensen, stjóri á vinnu- og miðnámsskúladeildini í mentamálaráðnum.

Sostatt avsannar hon tað, sum varð ført fram í Løgtinginum fyrr í vikuni, tá ið figgjarlógin varð til viðgerðar.

Har varð róð framundir, at skúlin fer at kosta heilar 95 milliónir, tá ið hann verður liðugur.

Og tað var mett sum ein álvarsom støða, sum hevði kravt, at kanning varð sett í verk av peninganýtsluni hjá mentamálaráðnum.

Men tað er ikki hald í tí, sum varð ført fram á tingsins røðarpalli.

Í mentamálaráðnum verður staðfest, at tilsamans eru játtaðar 74 milliónir til sjálva byggingina og tá er innbúgv og útgerð ikki við.

- Um ársskiftið høvdu vit brúkt 33,4 milliónir krónur og sostatt eru 40,6 milliónir eftir, sigur Una Joensen.

Samstundis er ætlanin at játta 8,4 milliónir á figgjarlógini í ár til innbúgv og útgerð. Samtykkir Løgtingið at játta peningin, fer skúlin at kosta tilsamans 82,4 milliónir krónur.

### Seinkaður eitt hálvt ár

Samstundis er greitt, at skúlin fer ikki at verða liðugur til næsta skúla ár, sum ætlanin var.

- Veðrið hevur verið ringt í vetur við nógvum ódnum og tað hevur darvað arbeiðnum illa, sigur deildarstjórin.

- Eitt nú fingu tey ikki arbeitt í einar átta vikur í vetur fyri veður, men veðrið hevur eisini ført aðrar seinkingar við sær.

Nú er ein nýggj tíðarætlan løgd og eftir henni verður skúlin liðugur og klárur at taka í brúk á nýggjárinum.

Tað er Landsverk, sum stendur fyri byggingini og haðani verður upplýst, at sum tað sær út higartil, fara bæði kostnaður og tíðarætlan at halda.

- Nú er skúlin innilokaður, so nú darvar veðrið ikki byggingini longur, sigur Una Joensen.

Annars varð skúlin reistur 16. apríl og tá var hátíðarhald í Hovi við røðum, tónleiki og ábiti.

# Svav fýra ferð í brummuni upp á tríggjar dagar

**Hjá summum er hugurin at ballast størri enn evnini og fyri fyrstu fer í langsamiliga tíð er løgreglan boðsend til Múla**

Løgreglan hevur ikki havt nógv at gera higartil um vikuskiftið. Bara okkurt smávegis herverk, eitt ferðsluóhapp í Streymnesi við ongum fólkaskaða og onkran smávegis húsaófrið.

Men á løgreglustøðini í Havn mugu tey meiri enn so ásanna, at mangan er hugurin hjá fólki at drekka, størri enn evnini.

Hetta vikuskiftið hava tey havt ein mann sovandi á løgreglustøðini ikki færri enn fýra ferðir hesar síðstu tríggjar dagarnar og tað nærkast nýggjum, føroyskum meti.

Og tað var ongin ársungi heldur, tí talan var um ein tilkomnan mann, sum rættiliga er farin í býin hetta vikuskiftið.

Annars hendi tað sjáldsama, at løgreglan varð boðsend til Múla. Hóast ongin býr har, eru nøkur hús í bygdini og har er eisini bøur, sum verður hoyggjaður um summarið. Men veg-ur er til bygdar og tað gera fólk sær dælt av viðhvørt.

Tað gjørdu tey eisini í fríggjavøldið, tí tá varð løgreglan boðsent, tí at onkur hevði koyrt runt við einum traktori og hevði rent hann fastan í bønum.

Kanska meiri álvarsligt og óumhugsað er tað, at onkur eisini hevur kappað eitt neyðbluss burtur úr einum bjargingarkransi umborð á einum báti undir Bryggjubakka og tað kann skjótt gerast alvorligt, tá ið bjargingarútgerð ikki virkar, tá ið brúk er fyri henni. Í hesum føri var tað tíbetur uppdagað, áðrenn ólukka stóðst av.

áki